Tórshavnar alfrøði:

# Fyrstu studentarnir í føroyskum búna

Í dag er vanligt at studentar eru í føroyskum búna, tá próvtøkan fer fram. Men nær var fyrsta ferðin at studentarnir vóru í føroyskum búna í hesum sambandi?

Teir fyrstu studentarnir vóru í 1942: Eyðun Sjúrður Winther (Sand) og Daniel Jacob Bærentsen (Kvívík).

Tann fyrsta studinan var í 1964: Tina Jórun Holmstrøm Johansen (Havn).

Tey, ið hava okkurt at viðmerkja í hesum sambandi, kunnu venda sær til Birgar Johannessen á tel. 314647 ella 214647.



**Studentarnir 1942**

A.f.v.: Daniel Magnussen (Kvívík), Thomas Nygaard, lærari, Peter Petersen (Klaksvík), Eli Nolsøe (Vágur), Poul Fritz Jacobsen (Tvøroyri), Peter Arne Rein, Eyðun Sjúrður Winther (Sandur), Mortan Vilhelm Nolsøe (Vágur), Daniel Jacob Bærentsen (Kvívík), Arnbjørn Marne Mortensen (Tvøroyri), Demmus Hentze (Sandur) og Jens E. Bergstedt, lærari.

F.f.v.: Inga Juul, Chr Haraldsen, lærari, Niels Ladegaard-Pedersen, lærari og Jonna Kristine Hansen.



**Studentarnir í 1964**

A.f.v.: Eyðun Andreassen, Mikkjal Arne Poulsen (Porkeri), Kristian Ludvig Rasmussen (Søldarfjørður), Andreas Sverre Lamhauge (Fuglafjørður), Joen Thomas Poulsen (Sandur), Bogi Hansen, Johannes Martin Eliasen (Fuglafjørður), Steintór Larsen (Fuglafjørður), Símun av Skarði, Trygvi Per Juul Thomsen, Jegvan Zacharias Bæk, Erik Haraldsen, Jon Waagstein Rasmussen, Kári Mikkjalsson Helmsdal, Tórstein Holm og Bjarni Johannesen (Vestmanna).

M.f.v.: Kaj Theodor Larsen (Porkeri), Ivy Grethe Guttesen, Eyðbjørg H. Berthelsen (Fuglafjørður), Tina Jórun Holmstrøm Johansen, Turið Sigurðsdóttir Joensen, Sára Hervør Isaksen og Jógvan Kristin Joensen.

F.f.v.: Elin Jóhanna Mortensen, Hanna Saloma Absalonsen (Vágur), Kristianna K. Eliasen (Leirvík) og Hjørdis Højgaard. Hanus Sørensen (Húsavík) er ikki við á myndini.

## U-21 er ávegis

Eitt av málunum, sum Jógvan Martin Olsen fleiri ferðir áður hevur nortið við, er, at Føroyar skulu hava eitt U-21 landslið.

Og á tíðindafundinum í FSF-húsinum staðfesti Óli Holm, formaður í FSF, at hetta er nakað, sum arbeitt verður við.

- Tað er avgjørt ein av fortreytunum fyri, at vit kunnu seta enn meira ferð á menningina av føroyskum fótbólti. Og tí er hetta heilt givið nakað, sum vit vóna kann koma upp á pláss skjótt.

- Men tað er givið, at hetta setir stór pengaligar krøv, og tí er tað ikki ein avgerð, sum bara verður tikin uttan víðari. Men sum sagt, so arbeiða vit við hesum spurninginum í løtuni, og vónin er, at hetta kann verða greitt til komandi undankapping, staðfesti Óli Holm.

Og hetta seinasta bendir á, at støða verður tikin til spurningin rættiliga skjótt. Tí tað er ikki long tíð, áðrenn lutakastið til kappingina verður, og innan ta tíð má spurningurin vera greiddur.

**-mørk**

## Sylla til B36

Beint fyri døgurða fríggjadagin boðaði B36 frá, at teir hava gjørt sáttmála við Sylla D. Amed, sum seinasta hálva annað árið hevur spælt við ÍF.

Á heimasíðuni verður sagt, at hetta er ein roynd hjá felagnum at styrkja um álopspartin, ið helst var veikasti parturin á liðnum í ár.

Sylla hevur seinastu 18 mánaðirnar sýnt stórum pørtum av føroyskum fótbóltsáskoðarum, at hann er ein framúr tekniskt sterkur spælari. Hann hevur eisini ferð og gjøgnumbrotsstyrki, og tí er lítið at ivast í, at hann er ætlaður at spæla ein týðandi leiklut, tá B36 komandi ár skal royna at verja meistaraheitið.

**-mørk**